# Um

# døglingar

# í Føroyum

eftir

Dorete Bloch



Hvalba

**© Føroya Náttúrugripasavn 2014**

## *Hvat er ein døglingur – eitt sindur um lívfrøðina*

Døglingur nevnist á latíni *Hyperoodon ampullatus*. Hann hoyrir til nevhvalirnar og er tann næststørsti norðuratlantiski tannhvalurin. Hann verður upp til 10 m langur, og kallhvalurin er størstur. Døglingur er javnt grásvartur, og kallhvalurin hevur ein bolla framúr á kúluni. Hann kann gerast upp í 6 m um miðjuna. Ikki kynsbúgvin djór og kvennhvalir hava rundan, gráan bolla. Tá ið kallhvalurin verður kynsbúgvin, verður bollin flatur og hvítur. Í undirmunninum hevur døglingur 2 ójavnt viggvaksnar tenn, ið eru 2-3 cm langar, men tær koma ongantíð undan hjá kvennhvalinum.

Døglingur ferðast einsamallur ella í smáum bólkum, ið sjáldan eru størri enn 20 djór. Bólkarnir, ið hava lagt beinini, hava verið upp á 1-7 hval, 2,2±0.04 í miðal, og tað hava verið stakir døglingar, pør við hvølpi, kvenndjór við ókynsbúnum hvalum og fleiri ókynsbúnir hvalir í bólki.




*Støðd á døglingabólkum, ið hava lagt beinini í Føroyum 1584 - 2014.*

Døglingur etur eins og grindahvalur, avgustur og Rissospringarar helst høgguslokk, men hann etur onnur sløg av høgguslokki enn hinir hvalirnir. Hann veiðir í miðjum sjógvi, har grindahvalur veiðir ovarlaga í sjónum og avgustur niðarlaga í sjónum. Døglingur finnur sær føði undir Íslandi og Noregi. Helst etur hann tíggjuermda høgguslokkin *Gonatus fabricii*, men kanningar fara í løtuni fram av føðini undir Føroyum, og hon inniheldur minst tíggju sløg av høgguslokki. Harumframt ber eisini til at finna fisk í maganum, sum t.d. sild, tosk, brosmu, rognkelsi, kongafisk, svartkalva, havmús, blálongu, ymisk skøtusløg og tindaháv, umframt trælsrass, krossfiskar og ymisk størri krabbadýr.

Døglingur makast tíðliga um várið, og burðartíðin er 12 mánaðir, so hvølpurin verður lagdur árið eftir, teir flestu í apríl. Hvølpurin er 3,0-3,5 m langur, tá ið hann er nýlagdur, og hann sýgur móðurina í 1 ár. Hvalirnir eru kynsbúnir 7-9 ára gamlir undir Íslandi og 8-12 ára gamlir við Labrador. Kallhvalurin er tá 7,3 m langur, og kvennhvalurin 6,0 m. Ein kvennhvalur fær 1 hvølp annað- ella triðjahvørt ár, og døglingur kann gerast upp til 30 ára (kvennhvalur) og 40 ára (kallhvalur) gamal.

## *Veiðisøga og stovnsstødd*

Døglingur er ein uppsjóvarhvalur, sum javnan er at síggja á 1000 metra dýpi, og hann er bara í Norðuratlantshavi. Eldri veiða og tær norðuratlantisku hvalateljingarnar (NASS) í 1987, 1989, 1995, 2001 og 2007 vísa stórt tal av døglingi serliga vestan fyri Svalbarð, út fyri Landnyrðingsíslandi – í ein útnyrðing norðan úr Føroyum – tað økið, ið skotskir og norskir veiðimenn nevndu "Døglingefeltet", í Danmarkarstræti og Davis Strait. Døglingur ferðast fram við Føroyum norðureftir í mars til økið norðan fyri og í ein útnyrðing úr Íslandi og suðureftir aftur í august-september.

Mett verður, at tað er ein vestligur og ein eystligur stovnur, men áðrenn tað verður kannað, verða døglingarnir í Norðuratlantshavi roknaðir sum *ein* stovnur. Farið varð ikki rættiliga undir at veiða døgling fyrr enn í 1877; tá høvdu skotskir kópaveiðimenn verið við Svalbarð og veitt roysning, men tað hevði hilnast illa, og tískil skutu teir døgling á veg heim. Skotland og onnur lond skutu ongantíð stórvegis av døglingi (2.000 í tíðarskeiðinum 1856-1970). Men veiðan gav tó so mikið av sær at byrja við, at Noregi eisini fór undir at veiða døgling í 1882. Handilsliga døglingaveiða Noregs fór fram 1882-1972. Í hesum tíðarskeiði skutu norðmenn 63.000 døglingar, og eftir tað var stovnurin minkaður rættiliga nógv. Við støði í NASS-hvalateljingunum í 1987, 1989 og 1995 (Annual Report, 1995) metti NAMMCO í 1995, at stovnurin í Landnyrðingsatlantshavi var uml. 40.000 døglingar.

## *Døglinga- og hvalaveiða Føroya – heimsins elstu veiðihagtøl*

Í sambandi við stórhvalaveiðu føroyinga, sum byrjaði í 1894, vórðu einstakir døglingar eisini skotnir úti til havs, til samans 99 døglingar í tíðarskeiðinum 1894-1935. Men føroyingar hava fyrst og fremst dripið teir døglingar, sum lógu so at siga flóðfríir, tá ið fólk komu upp um morgunin. Í gomlum døgum, t.e. áðrenn bátarnir fingu motor, varð farið eftir døglingi við árabáti, og vøttir vórðu smoygdir niður á tollarnar, so minst møguligt óljóð var, tá ið árin kom móti tollunum – so til bar at rógva at kalla ljóðleyst út til døglingin ella døglingarnar. Fyri at døglingurin ikki skuldi kava, varð ein vøttur stappaður í blástrið. Síðan varð høgt í døglingin, og hann varð mest sum leiddur at landi og síðan skorin á háls. Eingin ófriður mátti vera í fjøruni, og harumframt skuldi prestur, konur og børn halda seg burtur, og soleiðis var tað eisini, tá ið grind var. Nú á døgum siga menn, at tað ber ikki til at reka døgling, um gangur er frá bátamotorum, og tað er orsøkin til, at eingin rekur døgling, og at tað bert ber til at fáa fatur í teimum, ið eru farnir á land. Stundum ber til at reka hesar døglingar út aftur; tað varð eitt nú gjørt í Sandvík 21. september 1994. Tá vóru 4 døglingar komnir heilt nær landi, og teir vórðu sæddir, men riknir út aftur. (sí *NAMMCO, Annual Report 1995: Faroe Islands. Progress Report on marine mammal research 1994: 129-134*).

At døglingur hevur góða hoyrn og at hann bregður sera skjótt við, tá ið hann hoyrir ljóð, er enn ikki vísindaliga prógvað.

Døglingar verða ikki riknir á sama hátt sum grind, men døglingur verður dripin á júst sama hátt við at skera hann á háls.

At drepa døgling hevur verið skattskyldugt til jarðareigarar, kong, kirkju og bøndur á sama hátt sum at drepa grind, og tað er á sama hátt skrásett aftur til 1584, tó við somu ófullfíggjaðu upplýsingum frá tíðarskeiðinum 1584-1647 og als ongum upplýsingum frá tíðarskeiðinum 1648-1708. Frá 1584-2014 hava til samans 755 døglingar lagt beinini; av teimum hava 733 lagt beinini í

tíðarskeiðinum 1709-2013. Higartil eru 71 deyðir døglingar riknir á land (1709-2014), og vóru teir nóg feskir, vórðu teir havdir til matna, og spikið varð brætt til lýsi. Harumframt vórðu í tíðarskeiðinum 1894-1984 99 døglingar skotnir út til havs í sambandi við stórhvalaveiðu. Á henda hátt kemur heildartalið á døglingi í tíðarskeiðinum 1584-2014 upp á 830 hvalir.




*Árligt tal á døglingi - dripnir (660), riknir á land (71) og skotnir úti til havs (99) í tíðarskeiðinum 1584-2014. Frá tíðarskeiðinum 1584-1647 eru hagtølini ófullfíggjað, og frá tíðarskeiðinum 1642-1708, t.e. Gablatíðini, eru sum heild eingi tøl.*

August og september eru avgjørt teir mánaðirnir, har ið flestir døglingar leggja beinini, t.e. 82,0% av 619 mánaðarskrásettum døglingum, og tað merkir helst, at døglingarnir nú eru á veg suðureftir eftir at hava etið seg feitar alt summarið norðan fyri Føroyar. Tann besta tíðin á árinum til døgling í føroyskum sjógvi er sera stutt, og hon er á leið seinastu viku í august og tær tvær fyrstu vikurnar í september.




*Mánaðarliga býtið av dripnum døglingi í tíðarskeiðinum 1584-2014.*




*Tíðin á árinum, tá ið flestir døglingar leggja beinini, 1584-2014.*

Ein miðaldøglingur er 7-8 m langur og kann viga uml. 3 tons, og tað kann geva uml. 750-1.000 kg av tvøsti til matna. Spik hevur altíð verið høgt í metum sum gerandiskostur, tó er døglingsspik undantikið, tí tað loypir lívsýki á.




*Tann árliga nøgdin av døglingstvøsti í kg fyri hvønn føroying. Spikið er ikki etandi, tí tað loypir lívsýki á.*



*Hugsað ferðaleið hjá døglingi.*

Í Føroyum hava døglingar lagt beinini ella eru riknir á land á til samans 50 ymsum støðum runt um í landinum, men tvær tær norðastu bygdirnar í Suðuroy, Sandvík og Hvalba, eru tey pláss, har døglingur oftast kemur inn á. Her hava 543 (71,9%) av 755 døglingum lagt beinini. Hesar bygdir liggja nær við ferðaleiðina hjá døglingi, tá ið hann ferðast suðureftir um heystið, og helst er ferðaleiðin smøl. Ynski er um at fáa eina fylgisveinamerking av døglingi, og tað er so smátt farið undir at leggja hesa merking til rættis. Og vónandi fer henda merking at varpa ljós á henda spurning.




*Hvalvágir, har døglingur hevur lagt beinini í tíðarskeiðinum 1584- 2014.*

Til hesar bygdirnar, Hvalba og Sandvík, eru júst knýttar gamlar sagnir, sum eitt nú siga frá døglingi í Hvalba, súlu í Mykinesi og rekaviði. Hetta er alt góðgripir, sum áður høvdu stóran búskaparligan týdning, tí úrtøkan var ofta lítil. Sambært fólkatrúnni skuldu bæði Hvalba og Mykines verið ríkað við rekaviði, døglingi og súlu, um ikki varð talað ilt um hesar tríggjar gávurnar úr sjónum. Um tað varð gjørt, hvurvu tær úr bygdunum fyri alla tíð. Úrslitið er, at nú á døgum eru súlur í Mykinesi, døglingur kemur inn á Hvalba, men rekaviður legst ikki upp í bygdunum.

## *Hvussu stórt er veiðitrýstið á døglingastovnin*

NAMMCO er komið til ta niðurstøðu (1995), at føroyska veiðan higartil merkti eitt veiðitrýst upp á minni enn 0,1% árliga, og at eitt árligt veiðitrýst upp á upp til 300 døglingar ikki minkar um stovnin. Stovnurin er nú 40.000 hvalir, og talið er roknað við støði í NASS-hvalateljingunum í 1987, 1989 og 1995. Tað merkir, at hesir fáu hvalir, ið at kalla av sær sjálvum reka á land, verða dripnir og havdir til matna í staðin fyri at liggja og rotna, ikki er nøkur hóttan fyri stovnin.

*Døglingar býttir eftir hvalvág 1584-2014.*

| | Veiða/ hvalvág | Døglingar/ hvalvág | % veiða | % døglingar |
|---|---|---|---|---|
| **Hvalba** | 152 | 374 | 43,7 | 49,7 |
| **Sandvík** | 68 | 169 | 19,5 | 22,5 |
| **Øravík** | 7 | 15 | 2,0 | 2,0 |
| **Kollafjørður** | 5 | 13 | 1,4 | 1,7 |
| **Trongisvágur** | 10 | 13 | 2,9 | 1,7 |
| **Skopun** | 6 | 12 | 1,7 | 1,6 |
| **Hvalvík** | 5 | 10 | 1,4 | 1,3 |
| **Skálafjørður** | 3 | 10 | 0,9 | 1,3 |
| **Hestur** | 5 | 8 | 1,4 | 1,1 |
| **Miðvágur** | 3 | 8 | 0,9 | 1,1 |
| **Vágur** | 5 | 8 | 1,4 | 1,1 |
| **Eiði, Mølini** | 4 | 5 | 1,1 | 0,7 |
| **Fuglafjørður** | 3 | 6 | 0,9 | 0,8 |
| **Nólsoy** | 6 | 6 | 1,7 | 0,8 |
| **Sandavágur** | 2 | 6 | 0,6 | 0,8 |
| **Strond, Borðoy** | 1 | 6 | 0,3 | 0,8 |
| **Árnafjørður** | 2 | 5 | 0,6 | 0,7 |
| **Hovi** | 4 | 5 | 1,2 | 0,7 |
| **Hvannhagi** | 3 | 5 | 0,9 | 0,7 |
| **Norðskála** | 3 | 5 | 0,9 | 0,7 |
| **Fámjin** | 3 | 4 | 0,9 | 0,5 |
| **Kaldbak** | 4 | 4 | 1,2 | 0,5 |
| **Porkeri** | 4 | 4 | 1,2 | 0,5 |
| **Koltur** | 2 | 3 | 0,6 | 0,4 |
| **Sumba** | 3 | 3 | 0,9 | 0,4 |
| **Tórshavn** | 3 | 3 | 0,9 | 0,4 |
| **Borðoyarvík** | 1 | 2 | 0,3 | 0,3 |
| **Gøta** | 1 | 2 | 0,3 | 0,3 |
| **Húsavík** | 2 | 2 | 0,6 | 0,3 |
| **Kirkjubøur** | 1 | 2 | 0,3 | 0,3 |
| **Saksun** | 2 | 2 | 0,6 | 0,3 |
| **Ókendur staður** | 1 | 2 | 0,3 | 0,3 |
| **Vágseiði** | 2 | 2 | 0,6 | 0,3 |
| **Vestmanna** | 1 | 2 | 0,3 | 0,3 |
| **Æðuvík** | 2 | 2 | 0,6 | 0,3 |
| **Argir** | 1 | 1 | 0,3 | 0,1 |
| **Elduvík** | 1 | 1 | 0,3 | 0,1 |
| **Froðba** | 1 | 1 | 0,3 | 0,1 |
| **Fugloy** | 1 | 1 | 0,3 | 0,1 |
| **Hattarvík** | 1 | 1 | 0,3 | 0,1 |
| **Kvívík** | 1 | 1 | 0,3 | 0,1 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Norðragjógv** | | | | |
| **Leirvík** | 1 | 1 | 0,3 | 0,1 |
| **Mykines** | 1 | 1 | 0,3 | 0,1 |
| **Sandur** | 1 | 1 | 0,3 | 0,1 |
| **Selatrað** | 1 | 1 | 0,3 | 0,1 |
| **Skálavík** | 1 | 1 | 0,3 | 0,1 |
| **Skarð** | 1 | 1 | 0,3 | 0,1 |
| **Slættanes** | 1 | 1 | 0,3 | 0,1 |
| **Sørvágur** | 1 | 1 | 0,3 | 0,1 |
| **Viðvík** | 1 | 1 | 0,3 | 0,1 |
| **Vigrum, Vágar** | 1 | 1 | 0,3 | 0,1 |
| **Vestantil á Skúvoy** | 1 | 1 | 0,3 | 0,1 |



Í Hesti.